DAGSINS MEINING

Ósømilig framferð – men Tjóðveldið tegir!

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur aftur gjørt vart við seg á ein hátt, sum ikki sømir seg fyri ein landsstýrismann. Eitt er, at hann í Sosialinum skírir átakið hjá Vestmanna skúla fyri at vera politiska propaganda. Eitt annað er, at hann ger tað aftur á fundi við leiðslu skúlans, tá fólk annaðhvørt rýma av fundi ella verða ripað á dyr, tí tað knípur við onkrum føroyskum orði!

Men landsstýrismaðurin ger ikki tað, hann eigur at gera, tí tað er at viðgera trupulleikan hjá flestu skúlum. Føroyski fólkaskúlin hevur við verandi játtan ikki møguleika at fremja ta nýggju fólkaskúlalógina í verki. Orsøkin er hon, at flestu skúlar fáa ov fáar tímar, um tímatalið verður samanborið við tað, fólkaskúlalógin krevur.

Í fyrstu atløgu fáa skúlarnir tímatalið alt ov seint. Tá Mentamálastýrið boðar frá, at skúlarnir hava fingið tillutaða tímatalið, so passar tað heldur ikki. Fleiri skúlar gera vart við, at teir hava ikki fingið nakað tímatal. Tá tað so endiliga kemur – tveir mánaðir ov seint – er tímatalið ov lítið!

Her liggur trupulleikin, og tað er tað, sum Vestmanna skúli ger vart við. Hann kallar inn til tíðindafund, eftir at meiri enn ein fjølmiðil hevur tosað við skúlan um spurningin. Hetta hevur skúlin fullan rætt til sambært teimum vanligu rættindunum um skrivi-, tali- og hugsanarfrælsi. Men hetta er landsstýrismanninum ovboðið. Hann skírir átakið fyri politiska propaganda, tí álitislærarin er giftur einum politikkara úr øðrum flokki enn landsstýrismaðurin umboðar. Harafturat blakar hann varaskúlastjóran á dyr, tí hann hevur torført at orðføra seg, sum landsstýrismaðurin krevur!!!

Gjørdi landsstýrismaðurin rætt, royndi hann at loysa trupulleikan sum fólksins tænari. Og tað kann annaðhvørt gerast við at útvega skúlanum størri játtan ella broyta lógina, soleiðis at skúlarnir kunnu halda lógina. Men tað hevði sjálvandi verið eitt stórt afturstig fyri fólkaskúlan.

Hetta er triðju ferð eftir hálvum ári, at Torbjørn Jacobsen ger um seg á ein hátt, sum er ókendur í føroyskum politikki. Fyrst fekk løgmaður av at vita í eini samrøðu í Sosialinum. Herfyri fekk landsgrannskoðarin av at vita, at hann var ein "gemenur bókhaldari", samstundis sum mentamálanevndin fekk av at vita, og orð sum "kókað høna", sipandi til undanmannin í mentamálum, varð brúkt um álitið hjá nevndini. Og nú er tað so Vestmanna skúli, sum fær toyggið.

Tjóðveldisflokkurin – og føroyska fólkastýrið – hevur ein trupulleika, men formaður floksins hevur onga viðmerking, tá málið av álvara kemur fram. Hann, sum tegir, hann góðtekur! Men tað er sjálvandi torført hjá Høgna Hoydal at fara eftir sínum svorna stuðli, tá undanmaðurin í mentamálum meira ella minni varð offraður í eini størri ætlan!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Fiskivinnustevnan í Runavík – eitt stórt føroyskt tiltak

Atli Hansen
Gøtu 28.05.01

Í døgunum 15.–17. mai var stór fiskivinnustevna í Runavík. Løgmaður setti stevnuna og lýsti hana m.a. sum eitt tiltak, har føroyingar seta seg javnbjóðis við umheimin og bjóða hesum til kappingar við egnari framleiðslu á fiskivinnuøkinum. Ein kundi halda, at løgmaður tók í so rívan til, men sum stevnan gekk, so fekk hann rætt. Hetta gjørdist ein stevna ella ein framsýning, sum á flestu økjum kann sammetast við líkandi tiltøk í okkara grannalondum. Eitt sera væleydnað tiltak.

Bæði hugtakið »framsýning« og »stevna« verða nýtt um hetta tiltakið. Framsýning – tí her koma framleiðarar av alskyns tólum til fiskivinnuna at vísa fram tað nýggjasta á økinum og at hitta síni viðskiftafólk fyri kanska at fáa nýggjan íblástur. Stevna – tí her komu nógv saman bert fyri at hitta fólk, sum ein kennir røddina á ella hevur møtt á øðrum stevnum. Sjómenn, útgerðarmenn, framleiðarar, meklarar, útvegarar hava fragd av at heilsa upp á hvønn annan undir hesum umstøðum. Tær persónligu relationirnar fáa sítt.

Táið tankin um eina tílíka stevnu fór at gerast veruleiki, vóru vit ivaleyst nógv,ið høvdu okkara iva um hesir runavíkingarnir nú ikki høvdu sett sær ov høgt mall. Tað, sum vit kenna frá útheiminum av hesum slag t.d. í Trondhjem, Glasgow, Ålborg og Reykjavík hevur sæð ógvusliga stórt út og kundu vit tí kanska bert vænta eina miniútgávu av hesum, men so var ikki. Vit fingu eina stevnu, sum gav tí vitjandi kenslu av altjóðadámi. Her vóru nógvir útlendingar komnir bæði fyri at vísa fram, men eisini fyri at forvitnast.

Átakið fer uttan iva eisini at hava eitt munagott árin á hagtølini hjá føroysku ferðavinnuni í komandi tíðum. Mær varð sagt, at umleið 4000 fólk vitjaðu framsýningina hesar 3 dagarnar og eg havi fingið uppspurt, at til framsýningina í Glasgow plaga at koma á leið 8000 fólk.

Men hvar var føroyska pressan? Hvar var hon undir stevnuni og hvat hevur hon gjørt burtur úr stevnuni aftaná? Syndarliga lítið, táið hugsað verður um hvatið ein tilvildarligur ítróttarlandsdystur kann draga við sær av útvarps- og blaðmonnum. Hóast hesa væntandi undirtøku frá føroysku pressuni, kemur hetta tiltakið kortini at geva afturljóð. Nógv útlendsk blaðfólk vóru at síggja.

Eitt annað hjartasuff má vera um føroysku loyvismyndugleikarnar, sum løgdu sínar fótonglar fyri borðreiðingina um borð á Norrønu. Vavsturin av útskeinking av summum og billetsølu aðrar drykkir fekk mangt smílið fram frá útlendingum. Annars sá tiltakið við Norrønu sum mobilt hotell út at rigga sera væl.

Eisini stigtakararnir og fyriskipararnir mugu hava havt eina kenslu av, at hetta eydnaðist væl hjá teimum, tí longu áðrenn stevnan var at enda komin, ljóðaði tað í tjøldunum, at luttakararnir vóru bodnir við aftur um 2 ár. Annað hvørt ár er eisini tað vanliga fyri stevnurnar í teimum oman fyri nevndu býunum.

Stigtakararnir hava við hesum sett Føroyar við stórum, stavum víða hvar innan fiskivinnuna. Vit eru mong, sum frøast saman við tykkum um, hvussu væl hetta eydnaðist og vit fara helst at vísa tykkum størri álit frá byrjanini av næstu ferð.

Hjartaliga tillukku og góða eydnu.

Mentunarnátt 1. juni 2001

TÍÐINDASKRIV
Kunningarstovan í Havn

Hevur tú vitjað Fornminnissavnið eftir at tað er flutt niðan í Hoyvík, ella útisavnið Heima á Garði? Ella hevur tú verið í Eystarastovu í Tinganesi, har landsstýrismenninir ofta eru avmyndaðir? Nei? Jú, men so er møguleikin til staðar nú at nýta eitt gott summarkvøld til at vitja hesi forvitnisligu støðini og onnur afturat.

Fríggjadagin 1. juni verður skipað fyri einum mentunarkvøldi í Havn. Her verður nógv at síggja og uppliva hetta kvøldið, tá bæði søvn, stovnar, handlar og matstøð hava leingi opið og samstundis kýta seg fyri at gera kvøldið so fjølbroytt og hugnaligt sum til ber.

Sum dømi kann nevnast: Tónleikur, sjónleikur og rundvísingar. Tiltøk í Listaskálanum, Fornminnissavninum, Býar- og Barnabókasavninum, Pætursastovu, Sjónleikarhúsinum og Meiarínum. Gongutúrar á Reyni og Tinganesi og vitjan í Skansapakkhúsinum. Handlarnir í miðbýnum hava opið til kl. 23 og í SMS til kl. 24. Tiltøk verða bæði niðri í býnum og í SMS. Matstøðini hava sjálvsagt eisini opið, so ongin noyðist at ganga svangur.

Ein skrá verður yvir øll tiltøkini, so til ber at leggja kvøldið væl til rættis alt eftir áhuga og forvitni.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjelbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

VIÐMERKINGAR

Viðmerkingar til samrøðu við nevndarformannin í Maersk Air, Bjarna Hansen

Lasse Klein

Eisini undirritaði fegnast, men hvussu leingi? Heldur hendan hugburðsbroytingin fram hjá føroyskum politikarum sum nevndarformaðurin hjá Maersk Air vil verða við, so er ikki torført at ímynda sær, hvør støðan verður hjá føroysku vinnuni í framtíðini…

Bjarni Hansen saman við sínum stjórum fegnast. Tað gera ivaleyst eisini onnur íløgufelog úti í heimi, tí hann vil verða við, at hugburðurin hjá føroyskum politikarum er broyttur, tí nú ber til at áseta prísir, gera íløgur uttan stórvegis hóvasták í føroyska samfelagnum.

Vend er komin í, og tað er núverandi ferðslumálaráðharranum, Bjarna Djurholm, at takka, sigur Bjarni Hansen. Hann hevur víst heilt øðrvísi hugburð á økinum, enn undanfarin landsstýri hava gjørt, sigur nevndarformaðurin í Maersk Air í samrøðu við Sosialin 26. mai 2001. Somu sjónarmið ganga aftur í Dimmalætting. Vit rópa hurrá og eru fegin?

Hækkaðu prísirnar
Støðan hjá Danair/Maersk Air gjøgnum øll 70-ini og 80-ini var ein heilt onnur. T.d. 1. februar 1988 søktu teir um príshækkingar, og grundgevingin hjá teimum var hækkandi kostnaðarstøði fyri undanfarin tíðarskeið. Tað var sjálvandi ikki roknskapurin, sum lá til grund fyri hesi umsókn, men eitt skjal dagfest 07.01.88, sum nevndist »Bilag 2«. Ikki fyrr enn sakarmálið millum Maersk Air og Cimber var fyri í Sjó- og Handilsrættinum bar til at fáa atgongd til ávíst tilfar, sum heilt og fult gjørdi Danair/Maersk Air fyri skommum.

Tá blivu teir avdúkaðir. 1987 høvdu teir ein brutto umsetning uppá 120 mió. kr., og eitt avlop uppá 24 mió. kr., og brutto umsetningurin í 1986 var uppá 106 mió. kr., meðan avlopið var uppá 25 mió. kr., og neyvan hevur hetta heldur verið allur sannleikin, tí hann kunnu vit ikki svara uppá fyrr enn vit kenna allan roknskaparhátt teirra til fulnar.

Løgnar umsóknir
Duldarfullu og løgnu umsóknirnar um príshækkingar áðrenn 1988 er trupult at gera viðmerkingar til, men vit eiga at leggja okkum í geyma, at tá vóru teir EINSAMALLIR Á MARKNAÐINUM, EINGIN KAPPING VAR AT HÓMA Á NØKRUM ØKI.

So skjótt kapping tók seg upp á flogøkinum í mars 1988 var rópt um at lækka ferðaseðlaprísin, og at tað hevur gagnað Maersk Air, at framtøk við lágum ferðaseðlaprísum vórðu gjørd í fjør, kunnu vit ikki verða ósamd við teimum í. Máttmikla støða teirra á markaðinum ger hetta sjálvandi møguligt.

Skulu vit fegnast?
Eisini undirritaði fegnast, men hvussu leingi eg kann verða fegin um hetta loyvi eg mær at ivast í, tí lítil og eingin ivi er um, at endamálið við lækkaðu ferðaseðlaprísunum er at gera hin partin so fíggjarliga veikan, at hann ikki hórar undan.

Skulu vit fegnast?
Eisini undirritaði fegnast, men hvussu leingi eg kann vera fegin um hetta loyvi eg mær at ivast í, tí lítil og eingini ivi er um, at endamálið við lækkaðu ferðaseðlaprísunum er at gera hin partin so fíggjarliga veikan, at hann ikki hórar undan.

Skulu vit hava fría kapping á øllum økjum, so hórar eingin føroysk fyritøka undan, og so er spurningurin nær prísirnir aftur hækkað við risa lopum?

Hvussu leingi?
Tað, at vit yvirhøvur kunnu umrøða príslækkingar á flogrutuni hevur einki sum helst við Maersk Air at gera, men er beinleiðis eitt úrslit av støðuni hjá ATLANTSFLOG á marknaðinum! Hvussu leingi føroyska flogfelagið tolir eitt prískríggj móti RISANUM Maersk Air velst um, hvussu leingi teir eru førir fyri at halda seg á flogi, so einfalt er tað.

Hugburðsbroytingin
Heldur hendan hugburðsbroytingin hjá hjá føroyskum politikarum sum Bjarni Hansen, nevndarformaður í Maersk Air vil verða við, so er ikki torført at ímynda sær, hvør støðan verður hjá FØROYSKU VINNUNI Í FRAMTÍÐINI. Internationalar vinnufyritøkur við milliarda umsetningi kunnu so mangt, og tá hugburðsbroytingin er framd kunnu tær uppaftur meira!

Neyvan tey tímaløntu,ið oyðileggja okkara kappingarføri

Jógvan við Keldu
løgtingsmaður

Føroyski arbeiðarin og arbeiðsgevarin eru í sama báti, hóast teir av og á rógva ymiskliga. – Báðir partar hava brúk hvør fyri øðrum, og tað skal sigast, at arbeiðsgevarin er ikki hálvkriminellur, sum formaður Føroya Arbeiðarafelags ofta vil gera hann til.

Flestu føroyingar hava onkuntíð verið tímaløntir, sum hava kent hvat tað vil siga at hava arbeiði ein dag, og so varð uppiløga við ongari løn.

Fyri fjøruti árum síðani var eg sjálvur tímaløntur í hálvtannað ár. Eg arbeiddi á Klaksvíkar Hermetikk. Hetta var um tað mundið, tá flakaskering tráddi sínar barnaskógvar.

Mær dámdi so mikið væl arbeiðið, at eg hevði hugsað mær at hildið fram, í øllum førum nøkur ár, men mær var boðið læruplass á skrivstovu. Tað var orsøkin til at eg fór haðani.

Tímalønt ringast fyri
Eingin ivi er um, at tey, ið eru eina ringast fyri í samfelagnum hvat støðugum arbeiði og støðugari lønarútgjaldan viðvíkur, eru tey tímaløntu.

Nú hørðu orðini eru fallin millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur føroyska tjóðin – øll sum hon er – hugt at hesi syndarligu sjón.

Møguliga kann tað tykjast løgið fyri onkran, tá eg sigi, at arbeiðsgevarar og arbeiðarin eru í sama báti, hóast tað av og á verður róð ymiskliga.

Arbeiðsgevarin setur eitt virki á stovn. Til at hjálpa sær við at fáa hetta virki at ganga so avlop fæst bæði til vinning, konsolidering og til nýíløgur, spyr hann fólk, um tey hava hug at koma til arbeiðis. – Tey, sum svara ja, fáa sína arbeiðsmegi goldna í løn.

At arbeiðsgevarin og arbeiðarin eru í sama báti, kom best til sjóndar, tá kreppan var í 1993 og 94 í Klaksvík, har allir partar – arbeiðsgevarar, arbeiðarar, skiparar, maskinmenn og skipsfelagar annars og peningastovnur – stóðu saman, og tað skal eisini verða sagt, at tað var ein sonn frøi hjá Klaksvíkar Býráði at standa sum samskipari og leggja høli til hjá hesum hugsjónarfólki.

Klaksvíkingar vunnu á kreppuni við at standa saman.

Tímalønta fólkið er ikki væl fyri. Tað veit ein og hvør, sum livir tætt upp at vinnuni.

Tjóðveldisflokkurin ræðist skattalætta
Fyri at siga sum er, skilji eg yvirhøvur ikki Tjóðveldisflokkin, hvørja ferð hann noktar fyri einum skattalætta.

Hesir hava sungið upp í saman, at tað líkist ongum, at sjófólk okkara, sum livir eitt hart lív burtur frá familju síni, skal hava fingið ein skattalætta. – Føroyingar, skiljið hetta hvørið vil.

Nú ein nýggjur sáttmáli er gjørdur millum arbeiðsgevarar og arbeiðsmenn í Havnini og Klaksvík og kvinnur í Klaksvík, og seinni millum Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, átti at verið lagt fyri Føroya Løgting, at ein skattalætti varð givin generelt lág- og miðalløntum. – Um hetta ikki kom ígjognum, so hevði borið til at givið hinum tímalønta sersømdir.

Í hesum telduheimi við væl útbúnum fólki, áttu vit lættliga at kunna gjørt hetta. – Eg havi mælt formanni fólkafloksins á tingi til, at vit gjørdu hetta nú, júst í hesum døgum, nú nýggjur sáttmáli er gjørdur.

Hinvegin sær tíverri út til, at formaður Føroya Arbeiðarafelags, Ingeborg Vinther, hevur ongantíð skilt týdningin av hesum – til stóran skaða fyri arbeiðsfólkið – og munin á, at lønarhækkan bert fer aftur til lands- og kommunukassarnar, meðan ein skattalækkan hevði farið reint og beinleiðis til fólkið og givið føroyska kappingarførinum ein stóran bata. – Her má hugsast øðrvísi.

Hóast mótmæli frá Tjóðveldisflokkinum, hevur Fólkaflokkurin á tingi í seinastuni fingið ígjøgnum: 50 mill. krónur í skattalætta í ár, 40 mill. krónur næsta ár 40 mill. krónur í pensjónsgjaldi.

Sáa ikki mót í fólkið
Eg kann heldur ikki góðtaka, at Ingeborg Vinther ger okkara arbeiðsgevarar til hálvkriminellar. – Teir eru tað vanliga ikki.

Tað harmar meg eisini, at okkara almennu fjølmiðlar eru so gjøgnumgrípandi vinstravendir. Hvussu ber hetta til? – Dømini eru so mong.

Hesir báðir oman fyri nevndu partar sáa ikki mót í fólk okkara.

Lat meg til seinast siga føroysku arbeiðsgevarunum, at lønin hjá teimum tímaløntu er ikki avgerandi parturin,ið ger, at vit ikki eru frægari kappingarførir. – Okkara samfelag er alment vorðið ov dýrt at reka.

Standardline Miditower
P130-31-L
Pentium 4 1,3 GHz Geril • 128 MB RDRAM PC600 • 40 GB harddisk • 32MB nVidia Geforce2 MX grafikkort v/TV out • 12xDVD drev við forritum, disklastað, 16 bit integreað ljóðkort, standard hátalari • **56K internt DATA/FAX riser modem • Microsoft Windows MILLENIUM DK • Microsoft Works Suite 2000*:** Word 2000, Works 2000, Encarta World Atlas 2000, Picture it! 2000, Autoroute Express 2000 • **Microsoft spæl** • Standard knappaborð • Wheel mús • 1 ára garanti • 17" skermur
Kr. 18.495,-

SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo